*Eg havi gjørt nógv býtt í lívinum, men eg havi bara gjørt skaða á meg sjálvan og ikki onnur*

*Diego Maradona, heimsins besti fótbóltsspælari í sínari tíð*

SAMBAND
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo
tlf 341800

# ÍTRÓTTUR

# Sivic sekkjaður í Serbia

**Fyrrverandi venjarin hjá VB, B36 og KÍ, Tomislav Sivic, er koyrdur úr starvinum sum venjari í FC Vozdovac, eftir at liðið hjá honum tapti fýra teir fyrstu dystirnar í serbisku landskappingini**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Í summar byrjaði Tomislav Sivic í nýggjum venjarastarvi í felagnum FC Vozdovac, men úrslitini hava verið vánalig, og í gjár fekk Sivic sekkin í felagnum.

Fyrr í ár var ætlanin annars, at Sivic skuldi gerast nýggjur landsliðsvenjari hjá Uganda, men fótbóltssambandið í Uganda kundi ikki halda tær avtalur, sum tað hevði gjørt við Sivic, og tí varð samstarvið av ongum. Ístaðin gjørdist Sivic venjari í FC Vozdovac, sum spælir í fremstu serbisku fótbóltsdeildini.

### Taptu fýra dystir

Kappingin í Serbia byrjaði herfyri, og tað hevur gingið illa hjá liðnum hjá Sivic.

FC Vozdovac hevur tapt fýra dystir á rað, og tað var ov mikið fyri leiðsluna í felagnum, sum hevur sagt Sivic úr starvinum.

Tað byrjað við tapi fyri Reyðu Stjørnu og Partizan, og tað var at liva við. Tapini ímóti Smederevo og Banat vóru tó ov tung fyri felagið, sum í fjør endaði á fjórða plássi í bestu serbisku deildini.

Í ár var ætlanin, at góða úrslitið skuldi endurtakast, og heiðursmerki og europeiskur fótbóltur er málið hjá felagnum.

### Nýggjur venjari funnin

Tomislav Sivic var í fleiri ár venjari í Føroyum. Hann byrjaði í VB í 1995, og í 1997 skifti hann til B36, sum hann gjørdi til føroyameistar. Í 2000 og 2001 var Sivic venjari í KÍ, áðrenn hann fór av landinum aftur. Síðani hevur hann starvast heima í Serbia.

Nýggjur venjari hjá FC Vozdovac er 36 ára gamli Dusan Jevric, sum er ættaður úr Bosnia. Hann hevur áður vant feløg í fremstu deildini í Bosnia, og nú skal hann fáa FC Vozdovac aftur á beina kós.



*Tomislav Sivic yvirlivdi ikki vánaligu byrjanina í serbisku kappingini, og eftir fýra tap á rað fekk hann í gjár sekkin í felagnum FC Vozdovac*

*Mynd: Alexandar Djorovic*

# Formulaliðið




*Ítrottarsosialurin mannar Formulaliðið við leikarum, ið hava staðið seg væl í 21. leikumfari í Formuladeildini*

## KÍ-kvinnur mistu fyrstu stigini

**Sunnudagin varð fyrsta umfar í endaspælinum hjá kvinnum spælt, og fyri fyrstu ferð í ár vunnu meistararnir úr KÍ ikki sín dyst. AB vann við brotssparki í evstu løtu**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Kvinnurnar eru nú farnar undir sítt endaspæl í fótbólti. Fýra tey bestu liðini í grundspælinum eru farin í ein meistarabólk, har tey skulu spæla tvær ferðir ímóti hvørjum øðrum. Liðini fáa helmingin av stigunum frá grundspælinum við sær til endaspælið, og tí eru kvinnurnar hjá KÍ langt fremst og liggja til at vinna FM.

Men sunnudagin kláraði KÍ fyri fyrstu ferð í ár ikki at vinna ein dyst. KÍ spældi í Gøtu, og tað var um reppið, at GÍ vann dystin. Stutt undan leikloki var støðan 2-1 til GÍ, men so javnaði Rannvá Andreasen fyri KÍ, og úrslitið gjørdist 2-2.

KÍ kom betur frá byrjan, og Kristina Eyðbjørsdóttir skoraði longu í 8. minutti. Hanna Isaksen javnaði eftir ein hálvan tíma, og nakað fyri hálvleiksssteðgin legði hon GÍ fram um. Hendan støðan helt sær til tríggjar minuttir fyri leiklok.

Í hinum dystinum í FM-bólkinum spældu EB/Streymur og AB, og her eydnaðist tað AB at vinna dystin á Argjum.

Støðan var 0-0 í hálvleikinum, men í seinna hálvleiki vóru tað gestirnir, sum løgdu seg á odda. Maria í Brekkunum skoraði málið.

AB javnaði við málið hjá Elin Katrinu Haraldsen, og stutt fyri leiklok fekk AB brotsspark, sum málmaðurin Simona Heinesen setti í málið til 2-1 til AB.

Spælt verður aftur um vikuskiftið, og tá hevur KÍ enn ein truplan útidyst – hesaferð á Eiði. AB skal spæla á heimavølli ímóti GÍ.

Í b-bólkinum hjá kvinnum vann B36 5-0 á NSÍ, meðan dysturin millum HB og SÍ var av ongum.